TIL SØLU
Spildurnýggj, silvurgrá, 20'' gentusúkkla v/ 3 gearum til sølu vegna feilkeyp (ov lítil), til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 319837 / 317303

GUL GIANNI KAPPSÚKKLA
við 12 gearum til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 254133 ella 315526

TIL SØLU
Ein súkkla til 5-7 ára gamla gentu til sølu fyri 500 kr. Súkklan er ljósareyð.
Tlf. 317163

Teldur

SPØL TIL SØLU
Nintendo + 8 spøl + 3 Game Boy + ein Transfer pack til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 317810, Dánial

TELDA TIL SØLU
Fujitsu Siemens Scenic 560 PIII 500 MHz, 8 GB hardiskur, 128 MB ram, 19" skermur, Super geforce MX400 64MB tvout skermkort, DVD/CD-rom, hátalarar vid subwoofara. Windows 2000 og ella Windows 98, Onnur forrit fylgja eisini vid. Prisuppskot 7000 kr.
Tlf. 218414

PLAYSTATION
Sony Play Station við memory card og eitt spæl. kr. 750
Tlf. 218320

FIFA 2002
til Playstation verður býtt um við FIFA 2001. Vilt tú ogna tær FIFA 2002 við at lata okkum fáa FIFA 2001, so ring nú, so fær tú ein demodisk við.
Tlf. 448097

TIL SØLU
Ein Nintendo 64 v/ tveimum joystickum, tveimum spelum (Zelda og James Bond 007) og einum adaptara til.
Tlf. 316895 - 258777

Tónleikur

TIL SØLU
Klassiskur konsertgittari av merkinum Jose Ramirez árg. 1984 til sølu.
Tlf. 361299

TIL SØLU
Ein Philips ghettoblaster - cd og tape, til sølu fyri 500 kr. Keyptur í Skotlandi, lítið brúktur. Áhugað vinarliga ring
Tlf. 224012 eftir kl. 18

BASSPEDAL
Ein Zoom BFX-708 multi-effect basspedal er til sølu. Lítið brúkt.
Tlf. 253468

Út- & Sjónvarp

TIL SØLU
Eitt sony Stereo video til sølu fyri 2800.- (nýprísur 5000.-)
Tlf. 264891

HÁTALARIR
Jamo højtalere, Consert 5, med guldstik og mulighed for BI-wiring. 2 stk. 2.950,-
Tlf. 447927

SAMSUNG
TV med indbygget video. Incl. fjernbetjening i org. emballage. Kr. 1.940,-
Tlf. 447927

TIL SØLU
Ein Lumatron cd-walkman til sølu fyri 400 kr. Einki brúktur. Áhugað vinarliga ring
Tlf. 224012 eftir kl. 18

TIL SØLU
Eitt Philips 25" sjónvarp, 5 ára gamalt, til sølu fyri 2.500 kr. Áhuga vinarliga ringi
Tlf. 224012 eftir kl. 18

SAMSUNG SJÓNVARP
Vælhildið, 21" Samsung sjónvarp til sølu fyri 2.200 kr. Nýprísur 5.000 kr. Tlf. 321669 / 211428
e-mail: alh@farodane.fo

JVC SJÓNVARP
til solu vegna plásstrot fyri 1.700 kr. Riggar væl.
Tlf. 226252 ella 319460

Ymiskt

FERÐ TIL NOREGS
fyri ein í 4 koyggju kamari við hondvaski verður seld við avsláttri.
Tlf. 228822

SOLARIUM BÍLIGA TIL SØLU
Solarium á beinum at førka undir songina, hevur 6 miðalgóð rør, til sølu fyri 400 kr. ella minni. Skal bara ÚT!
Tlf. 314209 e. kl. 18

TIL SØLU
Trý vindeygu, H=150, B=190. Tveir radiatorar, H=30, B=280. Alt fyri 1.000 kr.
Tlf. 423429, e. kl. 18

MOTOROLA FARTELEFON
modell: 3888, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 255279

FERÐIST Í SANDOYNNI
gisti á Mýruni í Húsavík. Allir vanligir hentleikar. Sera vakurt útsýni.
Ring tlf. 318037

VENJARI SØKIST
Høvuðsvenjari til svimjifelagið Ægir søkist til svimjiárið 2002-2003. Løn sambært sáttmála. Umsókn sendast til Ægir, Postboks 342, 700 Klaksvík, í seinasta lagi 15. juli. Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Dan Mikkelsen á tlf. 222207.
Ægir

MOTORSÚKKLUTASKUR
Tríggjar óbrúktar motorsúkklutaskur – Kappa – til sølu. Nýprísur 6.500 kr. seljast fyri 2.500 kr.
Tlf. 315725 ella 215725

BENCHPRESSBONKUR
Benchpressbonkur við 80 kg í vektum. 2 stengur og 3 hondvektir fylgja við, til sølu fyri einans 3500.-
Ringið 264891

HOYRIVERN
til sølu fyri 400 kr. Keypt fyri 1.000 kr. Áhuga vinarliga ring
Tlf. 224012 eftir kl. 18

TIL SØLU
Eitt OBH-kreppujarn til sølu fyri 200 kr. - lítið og onki brúkt. Áhugað vinarliga ring
Tlf. 224012 eftir kl. 18

SÍLAVEIÐA
Á Nesvatni eru altíð nøkur stór ælabogasíl, 1-3 kg - at fáa. Kostnaðurin: 175 kr. pr. tráu um dagin. Fleiri saman fáa avsláttur.
Tlf. 447565/260887

YNSKIST
Ein kol komfýrur ynskist til keyps. Ring eftir kl. 18.
Tlf. 361968

BINDIMASKINA TIL SØLU
Ein lítið brúkt Brother KR 270 bindimaskina og óbrúkt rangapparat KR 260 til sølu fyri 1/2 pris – 7.000 kr.
Tlf. 332845 ella 265308

NOKIA 3310 CR
við ladara og tveimum frontum til sølu fyri 900 kr. Er lítið brúkt.
Tlf. 257121 - 314699

YNSKIST
Brúktur bjargingarvestur, std. 5-7 ár, ynskist til keyps.
Tlf. 333074 - 315572

INNHURÐAR
í góðum standi, bíliga til sølu.
Tlf. 316230 ella 225028

BARNASMYKKUR
Alt til tjóðbúnan sera bíliga til sølu. Til smágentur og vaksin komplett sett, tin, silvurplett ella sterling silvur. Til dreingir og menn skógvaspennir og knappar, tinnsølv og sterling silvur. Fæst á Eysturoyar Heimavirki, Norðoya Heimavirki og Suðuroyar Heimavirki. Vit senda um alt landið.
Sp/f Alvi, tlf. 373169

TÝSKLAND-FØROYAR!
Kom við 12. Manni til Týsklands í oktober. Úr Føroyum mánadagin 14. okt. Heim aftur leygardagin 19. okt. Kostnaður 4.489,- kr. Alt íroknað. Ring og hoyr meira, ella les á: www.footballsupporters.fo
12. Maður, tlf. 213212

HEILSANIR

Góða Solfryd!
Hetta hevði tú ikki væntað. Tillukku við degnum.
Heilsan, vit trý

Góða Mirjam
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum. Jesus pápi signi tína framtíð. Bestu ynski frá
mammu, pabba, Jan og ommuni

Hesar báðar fylla 46! Tillukku ynskir
ja, gita !!!

Góði abbon
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum 1. juli, og alt gott í framtíðini ynskja
Rúna, Bjarni, Hallur og Sólja

Góði elskaði Magni
Longu 2 ár! Tillukku við fødingardegnum 30.06. Muss og klemm.
Mamma og babba

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

TILTØK

Ebenezer
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Filadelfia, Landavegur 22
Í annaðkvøld kl. 21 Bøn fyri býnum.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið
Týskvøldið kl. 20 Bibliutími, Lukas kap. 10 vers 21-42.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, har tey ungu luttaka við vitnisburði og sangi.

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Mikukvøldið kl. 20 Møti.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 19 Møti við Mervin frá Shri Lanka.
Vælkomin í kelduna: www.keldan.fo

Stranda missiónshús
Møti verður í missiónshúsinum mikukvøldið kl. 20 við Kurt Westmann og Árant Johannesen. Innsavnað verður til arbeiðið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Siloa, Fuglafirði
Bøn, bibliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30, Poul Jóhan Djurhuus talar. Evni: Endaliga tilbúgvingin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Mikukvøldið kl. 20 Bibliutími.

Betel, Vágur
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

Dagtilhaldið Føvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Frá 1. juli til 17. august hava vit opið frá kl. 13-17.
2. juli
kl. 15 Fyrilestur »Heilsugóður matur«, Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu- og húsarhaldsfrøðingur.
Á ólavsøku verða framsýningar í Tilhaldinum. Á miðhæddini er ein fólkalívsmyndaframsýning og í kjallaranum ein hugleiðing í litum av kirkjubøstólunum.
Opið verður 28., 29. og 30. juli kl. 16-20.
Somuleiðis verður møguleiki at keypa sær ein drekkamunn við ábiti.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Bliv limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

AA-fundir í Havn
Reinsarií, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvønn leygardag kl. 17.00 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgotu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá mánadegi 8.7.02 til mikudagin 31.7.02.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post: sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur: sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Javni
Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Køliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutið, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, fødingardagskort og peak flow meter.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur: fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
8.7.-14.7. Bert telefonviðtala.
15.7.-21.7. Stongt.
22.7.-4.8. Bert telefonviðtala.

Føroyingafelagið í Aalborg
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17.00-19.00 og Leygarkvøld 23.00-03.00.
Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasiðuni www.alaborg.dk

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa: postur@faroehouse.dk
Heimasíðan: www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Friðli tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

BRÚDLEYP

Av misgáum kom brúdleypslýsingin ikki við leygardagin.
Leygardagin 29. juni *giftust* Turid Madsen, Tórshavn og Hjalmar Augustinussen, Sandavágur, í prestagarðinum í Sandágerði.

Leygardagin 15. juni *giftust* í Skjoldhøj kirke, Brabrand, Marianna Vang og Jóhan E. Simonsen, bæði Árhus.

Leygardagin 6. juli kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Sonja Juul Ravnsfjall og Eyðun Kjølbro, Klaksvík. Veitslan verður hildin í Skálanum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 20. juli kl. 14.00 giftast í Kelduni í Skálafirði Kristina Nónklett Jacobsen, Glyvrar og Jógvan Martin Hansen, Strendur. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma í veitslu í Bygdarhúsinum á Strondum kl. 18.30, kunnu ringja á tlf. 224088 ella 448355 í seinasta lagi 7. juli.

Leygardagin 3. august kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Arnleyð Krosslá og Hans Jacob W. Hjelm, Vágur. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at vera við at gleða brúðarparið kunnu ringja á tlf. 373357, 373207 ella 373094 áðrenn 15. juli.

Leygardagin 17. august kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Rannvá Sólheim, Saltangará og Egon Joensen, Sandavágur. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu ringja á tlf. 322321 ella 264838 í seinasta lagi 26. juli.

DIAMANTBRÚDLEYP

Leygardagin 6. juli hava hjúnini Edith og Jógvan Johannesen, Lamba, diamantbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá diamantbrúðarparið, eru vælkomin í kappróðrarneysti hjá NSÍ á Glyvrum, sama dagin millum kl. 9.00-14.00.

PRÓGV

Sylvia R. Hansen, Nólsoy, hevur tikið prógv sum sosialráðgevi á Ålalborg Universitet.

Á universitetinum í Århus hevur Juanna Schrøter Joensen av Tvøroyri, lokið Bachelorútbúgving í økonomi og matematikk.

Sakaris Frederiksen, Porkeri, hevur lokið prógv sum Serviceøkonom innan ferðavinnu á Lyngby Uddannelsescenter.